# Gera klárt til ferjuna

*Farið er undir havnarútbyggingarnar, sum gerast skulu í samband við nýggju sandoyarferjuna. Bygt verður út á Gomlurætt, í Hesti og í Skopun*

EDVARD JOENSEN



*Í Hesti verður gjørt klárt at taka í móti nýggju ferjuniMynd: Jens kristian Vang*

Í samband við at nýggj sandoyarferja verður smíðað, er neyðugt við um- og útbygging av teimum havnarløgum, har ferjan skal leggja at. Samlaði kostnaðurin av hesum fer at liggja um 20 milliónir krónur.

Í Hesti verður havnin dýpt, og nýggj atløgusíða verður gjørd. Atløgusíðan verður gjørd vinkulrætt inn á grótkastið. Tað vil siga, at hon fer at liggja framvið landi. Mett verður, at kostnaðurin av hesumpartinum av verkætlanini fer at liggja um tíggjumilliónir krónur, sigur Signar Heinesen á havnardeildini hjá Landsverkfrøðinginum.

Á Gomlurætt er eisini neyðugt við útbygging, nú nýggja ferjan skal loysa Trónd gamla av. Hendan nýggja ferjan er størri enn Tróndur og hevur eisini kúlustevni, sum ger, at ávísar broytingar skulu gerast uppi á landi.

Bilskráin - tað, sum í vanligari talu verður nevnt rampan - skal breiðkast. Og sum nevnt skal pláss gerast fyri kúlustevninum á nýggju ferjuni. Hesin parturin verður mettur at kosta einar fýra milliónir krónur, sigur Signar Heinesen.

Eftir er so Skopun. Har skal eisini gerast nakað, so nýggja ferjan sleppur at. Men har er skráin so gamal, at mett verður ikki skilagott at umvæla hann. So har verður nýggjur skrái gjørdur, sum er breiðari enn tann gamli. Eisini her er neyðugt at gera pláss fyristevninum á nýggju ferjuni. Her verða seks milliónir brúktar til verkætlanina, sigur Signar Heinesen.

Men tað er annað arbeiði í gongd í Skopunar Havn í løtuni, sigur Signar Heinesen. Arbeitt hevur verð eina tíð við at gera brimgarðin lidnan. Og í tí sambandinum verður innsiglingin til sjálva havnina eisini breiðkað, so pláss verður hjá nýggju ferjuni at sleppa inn. Men hendan breiðkingin er ikki partur av verkætlanini, sum eisini umfatar Gomlurætt og Hest.

Hesar báðar verkætlanirnar eru leysar hvør av aðrari, sigur Signar Heinesen á havnardeildini hjá Landsverkfrøðinginum.

# Ein vinaligur lestrarbýur

*Næststørsti býurin í Danmark, Århus, er sera vinaligur og hugnaligur býur, sum passar væl til føroysku sálina. Har er alt, sum annars finst í einum stórbýi, samstundis sum tað lítla og heimliga framvegis er tøkt*

EDVARD JOENSEN




Tað búgva rættiliga nógvir føroyingar í Århus. Teir allarflestu eru í lestrarørindum, og er her talan um fleiri hundrað. Hesir hava teir flestu, saman við fastbúgvandi føroyingum í býnum, tikið seg saman í Føroyingafelagið í Århus. Eitt sera virkið felag, sum millum annað gevur út blaðið Áarósan.

Áarósin viðger vanliga evni, sum uppi eru millum útisetarnar í býnum. Men sjálvandi verður eisini nomið við annað. Eitt nú aktuel evni úr Føroyum.

Seinast í februar kom út ein serútgáva av Áarósanum. Hendan útgávan var um útbúgvingar og teir møguleikar, ein sum lesandi føroyingur hevur í Århus.

Ein fastur táttur í teimum bløðum, sum komin eru frá Føroyingafelagnum, er tátturin, har fólk skriva um ta útbúgving, tey eru farin undir. Soleiðis skrivar ein um, hvussu tað er at lesa til kosmetolog, ein annar um musiklesnað, ein triðji um at lesa teologi og so framvegis. Møguleikarnir eru nærum óteljandi, og útbúgvingarnar umtrent líka nógvar sum føroyingarnir í býnum.

Talið av lesandi føroyingum í Århus er eitt sindur skiftandi. Tað vísti seg, at miðskeiðis í nítiárunum vóru rættiliga nógvir lesandi føroyingar í býnum. Um tað var kreppan heima í Føroyum, sum gjørdi, at fólk søktu sær útbúgving uttanlands, er ikki til at siga. Men ein sannroynd er, at talið er minkað nakað seinnu árini.

Føroyingarfelagið í Århus heldur, at tað er rætt, at føroyingar, sum koma til Danmarkar at lesa, eiga at koma til Århus. Og fyri at kunna eitt sindur um møguleikarnar fyri hesum, hevur felagið nú savnað greinar, sum viðgera útbúgvingarnar og møguleikarnar annars í býnum í eina serútgávu av Áarósanum. Blaðið er sent føroysku pressuni, bókasøvnum og skúlum. Her verður umframt útbúgvingum eisini greitt frá íbúðarmøguleikum og øðrum umstøðum í býnum.

Tað er soleiðis, at fólk, sum koma nýggj til Århus, kanska hava eitt sindur truppult við at koma til sættis. Men her er Føroyinafelagið ein sera góður vinur at venda sær til. Felagið vil fegið hjálpa teimum, sum koma nýggj og ókend niður at lesa ella á annan hátt at búseta seg í Århus.

Umframt at finna serútgávuna av Áarósanum á skúlum og bókasøvnum, kunnu fólk, sum hava ætlanir um at fara uttanlands til dømis í summar, venda sær til Føroyingafelagið í Århus at fáa vegleiðing og stuðul.

Til ber at ringja á tlf. nr. 0045 86 18 06 04, sum eisini er telefaxnummarið hjá felagnum.

Og tað ber sjálvandi eisini til at fara inn á heimasíðuna hjá Føroyingafelagnum.

Adressa har er:
http://welcome.to/aarstova
e-mail adressan er:
aarstova@teliamail.dk
Adressan hjá Føroyingafelagnum er:
Den Færøske Forening
Vestergade 48 D
DK 8000 Århius C

# Vandalisma á Farstøðini

*Viðførisboksirnar á Farstøðini í Havn fáa ikki frið. Úrslitið er, at fólk hava ongastaðni at goyma ferðagóðs eftir klokkan 17, tá diskurin verður afturlatin*

EDVARD JOENSEN

Tað ber ikki til at seta eina tasku frá sær á Farstøðini í Havn eftir klokkan 17. Tá letur tænastudiskurin aftur, og einki pláss er í húsinum at goyma viðføri í.

Hóast boksir standa í bíðirúminum, eru hesa ónýtiligar. Tær fáa stutt og greitt ikki frið at standa, sigur Reidar Nónfjall, stjóri á Strandfaraskipum Landsins, sum umsitir tænastudiskin á Farstøðini.

Reidar Nónfjall er samdur í, at tænastan er ikki nóg góð í løtuni. Men arbeitt verður við málinum, og hann væntar rímiliga skjótt at vera komin til eina loysn, sum er nøktandi fyri tey ferðandi.

Reidar Nónfjall sigur, at tey hava roynt at gera boksirnar aftur, so hvørt tær verða oyðilagdar. Men tað er ikki haldbart í longdini, alla tíðina at skula taka upp eftir ótangum, sum ikki duga fólkaskikk. Hinvegin eru boksirnar av slíkum slag, at tær als ikki eru ætlaðar ella egnaðar at standa soleiðis alment frammi. Hetta eru boksir, sum nýttar verða inni á til dømis svimjihallum til at goyma klæði í, og altso ikki til at standa á almennum støðum, har so nógv fólk ferðast. Arbeitt verður við at fáa rættiligar boksir settar upp. Men tað er ein peningaspurningur. Og umframt er tað als ikki Strandferðslan, sum eigur húsið. Tað ger Tórshavnar Havn, sum so leigar aftur til Strandferðsluna. Sostatt er tað Havnin, sum skal bera kostnaðin í fyrsta umfari. Og øllum hesum verður sum sagt arbeitt við, sigur Reidar Nónfjall.

Fólk, sum ferðast um Farstøðina, ilskast inn á, at ikki ber til at seta viðføri frá sær eftir klokkan 17 seinnapart. Tá verður tænastudiskurin stongdur, og tænastuupplýsingin flutt yvir til bilstøðina Bil, sum er í sama húsi. Men har ber ikki til at goyma viðføri, tí høli er ikki til tess.



*Tá klokkan er fimm seinnapart, verður tænastudiskurin stongdur, og bilstøðin Bil tekur yvir. Men har er einki pláss hjá fólki at seta ferðagóðs frá sær*

Reidar Nónfjall sigur, at nú tey arbeiða við málinum, eru tvinnir møguleikar. Annaðhvørt at fáa til vega nýggjar, haldbarar boksir, sum fólk kenna aðrastaðni frá, ella at lata fólk verða á staðnum, meðan skip og bussar koma og fara.

Men alt hetta er við í teirri ætlan, sum nú verður viðgjørd, sigur stjórin á Strandferðsluni. Og hann leggur aftrat, at tann ætlanin verður liðug, áðrenn summarferðingin byrjar.



# Í dag kemur Malan á fløgumarknaðin

*Hon er ikki óvon við at syngja á fløgum, ið koma á føroyska marknaðin og vit kenna røddina væl. Men á fyrsta sinni roynir Malan Thomsen seg sum einstakling á egnari fløgu. Fløgan kemur út í dag*




DAGFINN OLSEN

Malan Thomsen er millum royndastu sangfuglar í Føroyum. Hon er á mangari fløgu, bæði sum solorødd og í kórinum.

Hon er sostatt ikki óvon við at syngja á fløgu, men hon hevur ikki roynt seg sum einstakling á egnari fløgu áður.

Í dag kemur Malan so endiliga á marknaðin við egnari fløgu. Endiliga, má ein siga, tí seinastu 10- 15 árini hevur hon verið á rættiliga nógvum útgávum,men altíð hevur tað verið á fløgum hjá øðrum.

### Góð manning

Nógv vatn er runnið, síðani hon sang í bólkinum Teinar, har m.a. Leivur Thomsen, Finnur Hansen og Kári Jacobsen eisini vóru við.

Finnur og Malan fylgjast enn. Saman hava tey produserað nýggju fløguna. Kári Jacobsen er við sum sangskrivari og Leivur Thomsen er eisini at hoyra við sínum frálíka guitara.

Sum heild er manningin á fløguni tað, ið má kallast »kremið« í føroyskum tónleiki.

Umframt Maluna og Finn, leika Rógvi á Rógvu, Jan Zachariassen, Jóhannus á Rógvu Joensen, Niclas Johannesen, Kaj Johannesen, Leivur Thomsen, Óli Poulsen. Kórsangarar eru Anders Ørsager, Lena Andersen og Kim Hansen.

Malan og Finnur hava skrivað orð og løg, men eisini hava Niclas Johannesen, Kim Hansen og Kári Jacobsen sett orð og løg saman.

Upptøkurnar eru gjørdar í JacZac Studio, ÚF, Hjá Óla, hjá Rógva og heima. Óli Poulsen hevur ljóðblandað heima við hús og hann hevur mastrað saman við Lehnnert Kjeldsen í Dan Disc.

### Poppur

Tað eru tvey av fremstu tónleikafólkunum ið standa aftanfyri fløguna og á fløguni hjá Maluni hittast tey góðu nøvnini og burturúr er komið eitt gott úrslit.

Stílurin er avslappaður og ljóðmyndin er balsam fyri oyru og sál.

Javnvág og vakurleiki. Einki uppøst og einki, ið nervar oyragangirar. Røddin hjá Maluni og ljóðmyndin hóska væl. Her her rennur saman. Tey 10 løgini eru góð, vøkur og talan er um popp. Poppur, ið er skrivaður til bæði ung og eldri og sum er so hegnisliga framførdur og framleiddur, at hesum kunnu øll lurta eftir.

Malan hevur prógvað, at hon spennir frá rocktónleiki til barnasangir. Hóast Malan hevur sungið seg inn í hjørtuni á føroyingum á fløgum hjá so ymiskum sum Devon, Jóhannes Jakobsen og Terja og Føstufressum, so hevur hon ikki áður sjálv givið út. Tí er at fegnast um nýggju fløguna, sum er væl úr hondum greidd.

Ein av fremstu sangfuglunum hevur fingið hjálp frá mætastu tónleikarunum og úrslitið er har eftir. Ein vælljómandi fløga, sum kemur í handlarnar í dag.

**Hjá okkum fáast vognar og útgerð til allar flutningsuppgávur!**

- Viðfestisvognar sum lasta frá 325 kg. upp til 2.600 kg. –nógv model!'
- Eykalutir til viðfestisvognar
- Sekkjavognar, hydr. lyftiborð –arbeiðsbord
- Vognar til gassfløskur, oljutunnur, kassar, trappir –óteljandi møguleikar!
- Gafflar til heisan av plattum, vøru o.a.
- Tip - Ruskkonteinarir til trukkar
- Spennireimar og lyftistroppar
- Sleipikrókar til øll bilmerki!

Tosið við okkum!

**Kaj Andreasen & Co**

Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820




**Føroya Banki søkir eftir bankanæmingum**

Ert tú ein av teimum, ið torir at taka ímóti nýggjum avbjóðingum? So er hetta kanska nakað fyri teg, tí Føroya Banki søkir eftir fólki at byrja sum bankanæmingar.

Sum næmingur í Føroya Banka fært tú eina fjølbroytta og áhugaverda útbúgving, sum gevur kunnleika til øll peningalig viðurskifti, bæði verkliga og ástøðiliga. Eisini fært tú góðar møguleikar at útbúgva teg víðari tann vegin innan fíggjarheimin, ið tú hevur áhuga fyri.

Á henda hátt kanst tú menna teg, samstundis sum tú fært nýggjar avbjóðingar. Og tú verður við til at gera Føroya Banka enn betri.

**Er hetta nakað fyri teg?**
Ert tú virkin, hevur áhuga at starvast innan bankayrkið og hevur HH-, students, HF- ella líknandi prógv - ja, so verður tú kanska ein av komandi næmingunum í Føroya Banka.

Sum næmingur kemur tú at arbeiða sjálvstøðugt og saman við øðrum arbeiðsfelagum og viðskiftafólkum bankans.

At arbeiða í Føroya Banka snýr seg ikki bert um fíggjarviðurskifti, men eisini um at fáast við fólk, at veita ráðgeving og at bjóða tænastur fram. Tí eru tínir menniskjansligu og fakligu eginleikar týdningarmiklir.

**Send tína umsókn í dag...**
Umsóknin saman við avritum av prógvum og møguligum ummæli verður at senda:

*P/F Føroya Banka*
*Starvsfólkadeildin*
*Postboks 3048*
*FO-110 Tórshavn*

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 3. apríl 2000.

FØROYA BANKI

petur & petur • 320870